# Føroyskur dansur í Føroyahúsinum



Í sambandi við, at føroyska dansifelagið í Keypmannahavn, Fótatraðk, verður 15 ár, verður skipað fyri almennum føroyskum dansi í Føroyahúsinum á Vesterbrogade 17A leygarkvøldið 25. oktober.

Freistin at tekna seg til sjálvt borðhaldið er tíverri farin, men hurðarnar lata upp kl. 23.00 fyri almennum dansi, har øll eru sera vælkomin. Tað eru nú fleiri ár síðani, at møguleiki hevur verið fyri at fara til almennan føroyskan dans niðri, og tí vónar felagið, at nógv fara at koma til tiltakið, og at góður dansur verður alt kvøldið. Føroyska dansifelagið í Odense hevur boðað frá, at tey koma við einum ferðalagi at luttaka, og fyrireikararnir vóna, at onnur dansihugað eisini fara at koma.

Atgongumerki kosta 50 kr. Barrin í húsinum er opin um kvøldið, og út náttina verður súpan at fáa.

Fótatraðk eitt av fáu virknu dansifeløgunum uttanfyri Føroyar. Felagið, ið telur góðar 50 limir, er sera virkið og hevur verið tað øll hesi 15 árini. Felagið vónar, at tað við tiltakinum fer at eggja fleiri at dansa. Nýggir limir eru sera vælkomnir at tekna seg eisini.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo





JÓLABORÐHALD

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn
úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:

- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

**Úr havinum**
Stórt sildaborð
Roykţur og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

**Alskyns steikir so sum:**
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

**Flógvir rættir so sum:**
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

**Stórt ostaborð**
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

**Dessertborð við m.a:**
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

**Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.**

**20. – 24. Nov:**
**Undirhald:** Robert McBirnie
**Orkestur:** Jóan Magnus Band

**27. Nov.– 01.Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

**04. – 08. Des:**
**Undirhald:** Robert Mc.Birnie
**Orkestur:** Vestmenn

**11. – 15. Des:**
**Undirhald:** Hilmar Jan Hansen
**Orkestur:** Terje Rasmussen Band

JÓLAKEYP
HUGNI

**Keypið jólagávurnar á ferðini**
**Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.**








SMYRIL LINE

# Páll Finnur Páll á toppinum

**Heitasti sangurin í Føroyum í løtuni er um ein forelskaðan sjónleikara**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Hey, hey, gev mær ost uppá breyð.

Soleiðis verður lagt fyri í sanginum um tann forelskaða sjónleikaran, sum er besti umtókti sangurin millum føroysk ungfólk í løtuni.

Hvørja viku mátar Útvarpið hitan í føroyska tónalandslagnum, og uppgerðin verður brúkt sum grundarlag undir 15 teimum bestu, sum verður sent leygarkvøld.

Seinastu vikurnar hevur ein føroyskur sangur staðið seg væl á listanum, og hesin sangur er aftur hesa vikuna nummar 1.

Sangurin kallast Forelskaður Sjónleikari, og tað er Páll Finnur Páll, sum eiga sangin.

Sangurin hevði eitt sindur ilt við at sleppa upp eftir listanum fyrstu tíðina, men seinatu vikurnar hevur gingið sum smurt.

Sangurin er tikin av útgávuni hjá Páll Finnur Páll, sum kom út í summar. Bólkurin hevur annars havt framførslur í ymiskum samanhangum í hesum árinum, og teir vóru eisini við í Prix Føroyum.

Leygarkvøldið fara tveir av tónleikarunum í bólkinum at vera við í tónleikakappingini, sum Hotel Hafnia skipar fyri.



*Finnur Jensen syngur sangin um tann forelskaða sjónleikaran*






Kom og fá íblástur

# Vinnudagurin 2003 í Norðurlandahúsinum 7. novembur

**12:30** Í sambandi við at Føroya Arbeiðsgevarafelag fyllir 60 ár, bjóðar felagið luttakarunum á Vinnudegnum til ein bita í Norðurlandahúsinum.
**13.30** Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen bjóðar vælkomin
**13.35** Landsstýsmaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard
**13.45** "Fra lokal til global", Hans Kirk, stjóri í Danfoss
**14.15** Framløga av bóklingi um góðan nevndarsið, Vinnuhúsið
**14.45** Steðgur – Kaffi
**15.15** Er det muligt at finde ud af, hvad forbrugerne vil have, inden de selv ved det? Fokus på de nyeste fødevaretrends og anvendelsen af trends i fremtidens produktionsudvikling, Jakob Søndergaard, stjóri í Pej-gruppen - Sponsorerað av Granskingarráðnum
**16.00** "Værdibaseret Ledelse. Opnåelse af virksomhedens og medarbejdernes fulde potentiale", Jens Moberg, EMEA vice president Evropa, Microsoft
**16:30** Tá tað regnar á prestin, dryppar á deknin, Jógvan á Fríðriksmørk, prestur
**17.00** Stuttur steðgur
**17.15** Heiðursprógv fyri serligt átak
**17.30** Ársins virkið 2003 verður kosið
**17.50** Liðugt í Norðurlandahúsinum
**19.30** Galladøgurði á Hotel Føroyum

**Tilmelding innan 30. oktobur** á www.industry.fo ella við at ringja til Vinnuhúsið.

SANSIR TEL 355355

Stuðlað Vinnudegnum hava

Atlantic Airways · Føroya Sparikassi · Kaupthing · Virkisráðgeving Spf. · Statoil Samtakið · notio Framtaksfelag · bp · granskingarráðið The Faroese Research Council

R. C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn
Tel 31 18 64, Fax 31 72 78
industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry